HEILSANIR

Hetta er Lillian. Eg veit ikki, um tit kenna hana. Hon fyllir 12 í dag. Hjartaliga tillukku ynskir
E.P.P.

Góða Kristbjørg
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 4. febr.
Mamma og pápi

Góðu Dagny og Gerhard!
Hjartaliga tillukku á silvurbrúdleypsdegnum kyndilsmessudag.
Vit á Stangavegi 44

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 13. juli 01 so hugnaligan.
Ann-Mari og Jan

Tillukku, góði Jespersen
28. jan. fylti ein gamal unglingi á Lágargarði í Havn 76 ár. Hann eitur Hans Petur Jespersen ella betur kendur sum Jeppe. Vit ynskja honum hjartaliga tillukku við degnum.
Vinir

Góða Ronja
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Eisini ein heilsan til Hans Meinhard.
Kærar heilsanir, Ruby Sandra

Osla Heimustovu, Klaksvík
Góða mamma og omma, hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 1. febr. ynskja **børn, svigarbørn og ommubørn**



Góði Sonni
Hjartaliga tillukku á 5 ára føðingardegnum í dag ynskja
mamma, babba og Beinir

Halló, Jórun!
Den hugni, den hugni. Festligt ha? Tillukku við 22 ára degnum 30. jan. Ver ikki so tvør.
Heilsan, vit 8

Góða Gunnvá mostir
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum í morgin.
Bestu heilsanir, Haraldur, Niklas og Jákup

Hey, Poula
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum í dag. Vónandi fáa vit ein góðan bita.
Heilsan vit í undir- og yvirhúsinum

Góði, elskaði Oddur
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 1. febr. Jesus pápi signi framtíð tína.
Heilsan, mamma og babba

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:...

....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ....
Bústaður: ....
Bygd/býur: .... Tlf.: ....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 • 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«

HEILSANIR

Sólrun og Vígdis Magnusdøtur Jacobsen, Lopra
Elskaðu døtur og systrar, lukku og gleði á tykkara 20 ára degi 26. jan. Má Gud signa framtíð tykkara.
Kærar heilsanir frá mammu, pabba, Miriam og Vinny

Magnus Sólbergsson Jacobsen, Vágur
Góði, fitti Magnus, lukku og gleði á tínum 2 ára degi 26. jan. Somuleiðis til tín, góði Kári, við 4 ára degnum 4. febr. Má Jesus pápi signa framtíð tykkara.
Kærar heilsanir frá ommu, abba, Miriam og Vinny

Hey, góða Annika
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum 28. jan. Øll góð ynski í framtíðini.
Kærar heilsanir, omma og abbi og øll hini í húsinum

Góða Anja
Hjartaliga tillukku á 30 ára degnum. Takk fyri at tú ert so góð við okkum.
Heilsan, mamma, pápi og systir við fam.

Góði, fitti Oddur
Tillukku á 1 ára degnum 1. febr. Nøgvir mussar og klemm frá
ommu og abba í Sørvági

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

Avloysarastarv

Starvslýsing
Evnafrøðiliga kanningarstovan á Heilsufrøðiligu starvsstovuni søkir eftir einum evnafrøðingi til eitt avloysarastarv.

Tú skalt vera við til at menna og stovnseta kanningarhættir innan umhvørvis- og matvøruøkið og hava eftirlit við kanningarhættunum og góðskustýringarskipanini á kanningarstovuni.

Krøv til útbúgving og kunnleika
Tú skalt hava lokið prógv sum cand.scient., akademi- ella sivilverkfrøðingur í evnafrøði. Tú skalt helst hava kunnleika til nútímans evnafrøðilig tól og hava kunnleika um góðskustýring.

Umsøkjarar við starvsroyndum hava fyrimun, og tú skalt vera miðvís/ur og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Tíð og setanarviðurskifti
Starvið er fyri tíðarskeiðið 1. mars 2002 til 31. desember 2002. Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið, sí www.lnd.fo.

Umsóknin
Umsóknarfreistin er mánadagin 18. februar 2002. Prógv, CV og annað kann stílast til Maritu Poulsen, deildarleiðara.

Evnafrøðiliga kanningarstovan
Evnafrøðiliga kanningarstovan ger kanningar av mati, vatni, fóðri og umhvørvissýnum. Hon er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirliti av DANAK (Dansk Akkreditering), sí annars www.hfs.fo.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Maritu Poulsen, deildarleiðara, ella Bárð Enni, stjóra, á tlf. 356400.

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

Akademikari

Starvslýsing
Vit sóknast eftir einum akademikara, sum skal vera við til at kanna og gera frágreiðingar um umhvørviseitur í luft, jørð, vatni og verum.

Arbeiðið fevnir um at savna saman og viðgera data og at skriva fakligar frágreiðingar. Í ávísan mun skalt tú eisini vera við til at gera ætlanir fyri innsavnan av sýnum og vera við til at innsavna, viðgera og fyrireika hesi.

Krøv til útbúgving og kunnleika
Tú skalt hava eina náttúruvísindaliga útbúgving og hava góðan kunnleika til enskt mál.

Kunnleiki til kemi og biologi er neyðugur og kunnleiki til (øko-) toksikologi er ein fyrimunur. Best er, um tú hevur koyrikort til bil. Góður kunnleiki til elektroniska tekst- og dataviðgerð krevst.

Tú mást vera sinnað/ur at arbeiða saman við øðrum og gjarna vera umhugsin og systematisk/ur.

Tíð og setanarviðurskifti
Tú skalt helst kunna byrja 1. mars 2002. Starvssetanin er fyri eitt avmarkað tíðarskeið, fyribils til 31. desember 2002, men møguleiki er fyri at leingja um starvstíðina.

Løn og onnur setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið, sí www.lnd.fo.

Umsókn
við avriti av prógvi, viðmælum, CV og tilíkum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. februar 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mariu Dam, verkætlanarleiðara.

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

Sosialurin -har tað hendir